## Finningarløn fyri Mladic



Myndugleikarnir í Serbia siga seg nú vera til reiðar at rinda eina millión evrur í samsýning, um onkur kann koma við upplýsingum, sum kunnu hava við sær, at krígsbrotsmaðurin Ratko Mladic verður tikin. Samstundis hava myndugleikarnir hongt myndir av tí gamla generalinum upp á øllum løgreglustøðum kring landið. Altjóða krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur skuldsett Ratko Mladic fyri umfatandi krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Bosnia í árunum 1992 til 1995.

## Zuma framvegis skuldsettur

Ein dómstólur í Suðurafrika staðfesti í gjár, at Jacob Zuma, sum ætlandi fer at vinna forsetavalið seinni í ár, framvegis er skuldsettur fyri svik. Zuma hevur í fleiri ár stríðst ímóti skuldseting um svik í teirri tíðini, tá hann var varaforseti. Í fjør eydnaðist tað honum at fáa ein dómstól at leggja málið til viks, men við úrskurðinum í gjár er hann framvegis skuldsettur, skrivar Reuters. Avgerðin ávirkar tó ikki uppstilling hansara til forsetavalið, og hann hevur eisini møguleikan at biðja grundlógardómstólin leggja málið til viks.

# Føroyskt kjøt eigur einki pláss í handlum og matstovum

**Í mong ár hava føroyingar havt seyð og neyt, men ikki kann sigast, at vit eru komin langt, nú vit skriva 2009. Einki góðkent sláturhús er í Føroyum, og tað merkir, at einki føroyskt kjøt verður selt sambært reglunum í føroysku handilsdiskunum, ei heldur á føroyskum matstovum**

MATVØRA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan MBM-Kjøt gavst við sínum sláturvirksemi í Hósvík fyri skjótt fleiri árum síðan, hevur einki góðkent sláturhús til seyð og neyt verið í Føroyum.

Avleiðingin av hesum er, at einki føroyskt seyða-ella neytakjøt verður selt lógliga í føroysku handilsdiskunum, ei heldur á føroysku matstovunum. Enn minni verður føroyskt kjøt útflutt.

Føroyskt kjøt í handlum ella borðreitt á matstovum lýkur tí ikki tær ásetingar, sum eru galdandi í matvørulógini.

Matvøruvirki í Føroyum, sum virka sambært galdandi ásetingum, hava tí heldur einki føroyskt kjøt við í sínum útboði, hvørki seyða-ella neytakjøt.

Øll framleiðsla av viðskera, sum hesi virki standa fyri, verður tí eisini virkað úr innfluttum kjøti.

### Durasøla lóglig

Alt hetta merkir tó ikki, at føroyskir seyða- og neytabóndur ikki kunnu selja sína kjøtframleiðslu.

Durasøla, sum hon verður rópt, er ikki ólóglig. Bóndur kunnu selja kjøt til síni viðskiftafólk og onnur, ið ynskja sær føroyskt kjøt, bæði seyða- og neytakjøt. Tá er hetta í fyrsta lagi ein spurningur millum seljara og keypara. Tú kennur bóndan og hevur álit á, at hansara vøra er í lagi. Hetta er soleiðis eisini ein spurningur um álit.

Um so er, at kjøtið, sum brúkarin keypir, ikki er í lagi, kann Heilsufrøðiliga Starvsstovan eftir áheitan taka málið upp til kanningar.

Annars hevur vanlig durasøla av føroyskum kjøti sambært galdandi ásetingum einki við matvørumyndugleikarnar at gera.



### Eingin søla

Tað eru fólk, sum um heystarnar bjóða sær at fletta seyð fyri bóndur, og tað eru fólk, sum hava skorið neytafjórðingar fyri bóndur.

Í slíkum føri er vanligt, at tann, sum eigur kjøtið, kemur eftir tí aftur.

Niðurstøðan er, at tó at Føroyar í øldir hava borið seyð og neyt, kann føroyskt seyða-og neytakjøt í 2009 ikki keypast sambært galdandi ásetingum í føroysku handilsdiskunum, føroyskt kjøt kann ikki borðreiðast á føroyskum matstovum, og føroyskt kjøt kann ikki nýtast sum rávøra í framleiðslu av føroyskum viðskera og seljast í handlunum.

*Tað eru menn, sum fletta seyð og skera kjøt fyri bóndur. Maðurin á myndini er Jákup Jacobsen í Haraldsundi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*






*32 mans eru við Vesturvón hendan túrin, og skipari er rituvíkingurin, Erland Olsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Flakatrolarar bíða eftir avtalu

**Meðan bíðað verður eftir fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Noreg, royna teir fýra føroysku flakatrolararnir í gráu leiðini**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroysku flakatrolararnir royna í løtuni í gráu leiðini eystanfyri.

Hetta er annars tann tíðin, tá føroysku skipini vanliga plaga at royna í norskum sjógvi, men við tað, at fiskiveiðiavtalan við norðmenn ikki er komin upp á pláss, sleps ikki í norskan sjógv enn.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at Vesturvón kom á fiskileið í gjár.

- Vártúrurin plagar at roynast. Hetta er tíðin, tá toskurin leitar sær á leiðirnar út fyri Lofoten at gýta, og tá plagar slagið at vera gott.

Sum skilst, verða nýggjar samráðingar við norðmenn í næstum og reiðarar, sum varða av skipunum eystanfyri, vóna, at Føroyar við hesar samráðingar fáa sum mest burtur úr í okkara part.

Anfinn Olsen sigur, at 32 mans eru við Vesturvón hendan túrin, og skipari er rituvíkingurin, Erland Olsen.